# Føroya Banki millum tryggastu bankarnar í ríkinum

**Janus Petersen, forstjóri í Føroya Banka, greiddi í morgun errin frá, at bankin hevði lítla hálva milliard í yvirskoti fyrsta hálvár í ár. Samstundis er Føroya Banki mettur at vera millum tryggastu bankarnar í ríkinum**



Rólant Waag Dam

458 milliónir krónur í yvirskoti fyrra hálvár, og so ein fesk kanning, sum ger greitt, at Føroya Banki er fjórðtryggasti bankin í danska ríkinum. Einki er at siga til, at Janus Petersen er ein fegin maður í dag.

Stórur partur av yvirskotinum hjá Føroya Banka stavar frá søluni av Bakkafrost, ein handil, sum gav bankanum 380 milliónir krónur í kapitalvinningi. Hyggja vit burtur frá hesi sølu, er framvegis talan um eitt gott hálvársúrslit hjá Føroya Banka.

- Inntøkurnar frá banka- og tryggingarvirkseminum øktust 27 prosent, frá 242 milliónum til 308 milliónir krónur um samanborið verður við sama tíðarskeið í fjør, greiddi Janus Petersen frá á tíðindafundi í høvuðssætinum hjá Føroya Banka í morgun.

Ein av grundunum til vøksturin, er virksemi uttanfyri Føroyar. Føroya Banki hevur deildir bæði í Grønlandi og Danmark, og hesar hava givið avlop til bankan.

- Samanlagt standa hesar deildir saman við tryggingarvirkseminum í Íslandi fyri omanfyri 30 prosent av okkara inntøkum í dag. Í krónum og oyrum er talan um 32 milliónir hetta hálvárið, greiðir Janus Petersen frá.

## Millum teir tryggastu

Janus Petersen nýtti eisini part av tíðindafundinum at greiða frá feskari kanning. Danska blaðið Børsen hevur saman við greiningarfyritøkuni Niro Invest gjørt eina váðagreining av 99 teimum størstu bankunum í ríkinum, har Føroya Banki verður mettur sum ein tann tryggasti.

Merkisvert við kanningini er, at tað eru teir lítlu bankarnir, sum standa seg best. Hals Sparekasse, Fanø Sparekasse og Vinderup Bank liggja framman fyri Føroya Banka, sum verður mettur sum nummar fýra saman við Frøs Herreds Sparekasse og Frørup Andelskasse.

Vert er at hefta seg við, at Føroya Banki, sum ein av teimum lutfalsliga stóru bankunum á listanum, liggur frammanfyri aðrar bankar, sum eru nógv størri. Danske Bank er nummar 18, Jyske Bank 25 og Nordea Bank 75.

Í botninum í hesi greining – og harvið teir bankarnir, har tað er mest vandamikið at vera kundi, sambært Børsen og Niro Invest – er Morsø Sparekasse. Trý pláss omanfyri, tað vil siga triðaftast, er deildin hjá Eik Banka í Danmark.

*rolant@sosialurin.fo*

Ferðavinnusamstarv millum Grønland, Ísland og Føroyar

Øll, ið hava áhuga fyri at fremja ferðavinnusamstarv londini millum, kunnu søkja um stuðul til verkætlanir, vørumenning, ferðir og tílíkt. Umsóknir skulu í minsta lagi fevna um samstarv millum tvey av hesum trimum londunum.

Stuðul verður í høvuðsheitum veittur til verkætlanir innan hesi øki:

**Menning av 'kombinationsturisme'**
cruise, temaferðir, short break og tílíkt

**Útbúgving innan ferðavinnu**
uppihald til starvsvenjing, fakligar kanningarferðir, skúlaferðir, ferðavinnuútbúgvingar og tílíkt

**Marknaðarføring og greining av ferðavinnu**
víðkan av altjóða átøkum

Umsóknin skal skrivast á umsóknarblað, har møguliga nærri frágreiðing og fíggjarætlan kann leggjast við.

Umsóknarblað kann takast niður á www.mfa.fo ella www.northatlantic-islands.com
Umsóknin skal skrivast á donskum og sendast til:

**NATA**
**C/o Uttanríkisráðið**
Bryggjubakki 12
Postsmoga 118
FO-110 Tórshavn

Møguligir spurningar kunnu setast til:
Per Hansen á tel. 306133 ella teldupost: perh@mfa.fo

**Evstamark fyri at senda inn umsóknir er mánadagin 30. august 2010.**
Næsta freist at søkja er medio februar 2011

NATA er avtala millum ferðavinnuráðharrarnar í Íslandi, Grønlandi og Føroyum. Endamálið við avtaluni er at menna samstarvið innan ferðavinnu í Útnorðri við at styrkja, samskipa og tryggja eitt framrættað samstarv innan tey øki, har felags ferðavinnu áhugamál eru. Ein nevnd er sett at umsita NATA avtaluna og viðgerð umsóknir um stuðul til verkætlanir.

NATA
North Atlantic Tourism Association

# Triton eygleiðir Greenpeace

**Í dag er einki likið út um, hvat politiið fer at gera mótvegis Greenpeace-skipinum Esperanza, sum er komið í føroyskt sjóøki**



*Esperanza er tað nýggjasta og størsta skipið hjá Greenpeace*

Randi Jacobsen

Allan fyrrapartin var fundur á hægsta stigi í politinum, og tí hevur verið ógjørligt at spurt, hvussu sær út suðuri í føroyska sjóøkinum, har Greenpeace-skipið Esperanza hevur ligið ikki so langt frá boripallinum West Phoenix.

Greenpeace vil ikki upplýsa, hvar skipið er, og hvagar tað skal, og skipið hevur eisini sløkt sínar sendarar, so satelitteftirlitið ikki sær, hvør kósin er hjá skipinum.

Føroyska fiskiveiðieftirlitið er ikki uppi í átakinum á nakran hátt, og Færøernes Kommando og politiið hava avtalað, at bara Karen Marie Olesen, fúti og Peter Thaysen, politiovasti, kunnu úttala seg.

Og tey hava sum nevnt sitið á fundi allan fyrrapartin.

Peter Starklint, ovasti í Mjørkadali upplýsir tó, at danska verjuskipið Triton er har suðuri í føroyska sjóøkinum. Júst hvar, vil hann heldur ikki siga. Serdeilirnar hjá danska politinum eru umborð á Triton.

Hesar serdeidir komu til Føroya við flogfarinum leygarkvøldið.

Greenpeace hevur bjóðað oljuídnaðin av eftir oljuvanlukkuna í meksikanska flógvanum. Heimurin eigur ikki at vra so bundin av olju, sigur Greenpeace, sum seinastu dagarnar fleiri ferðir hevur mint á, at felagsskapurin ikki nýtir harðskap í stríði sínum.